

66 ára gamli norðuritalski designarin Giorgetto Giugiaro hevur seinast 50 árini sett sín serliga dám á italskt design. Í dag er hann ein av heimsins leiðandi ídnaðaðardesignarum



Nikon brúkti Giugiaro til at designa myndatólið Nikon F3



Giugiaro designar eisini pasta



Giugiaro hevur hevur verið við til at designa metrotokini í Keypmannahavn, sum koyra uttan tokførara

Giorgetto Giugiaro, Italdesign:

# Designar alt frá pasta til flogfør

**Italienarar eru kendir eru heimskendir sum designarar innan alt frá pasta til flogfør. Innan bildesign eru fleiri kend nøvn sum t.d. Bertone, Pinin Farina og Giorgetto Giugiaro, sum er ein av heimsins leiðandi ídnaðardesignarum**

DESIGN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hvat hava donsku metrotokini uttan tokførara, Marillepasta og F3 myndatólið hjá Nikon, við hvørt annað at gera? Jú, felags fyri hesi trý produktini er, at tey hava sama designara, italska superdesignaran Giorgetto Giugiaro.

Seinastu 50 árini hevur 66 ára gamli norðuritalski designarin Giorgetto Giugiaro sett sín serliga dám á italskt design. Í dag er hann ein av heimsins leiðandi ídnaðardesignarum.

Hóast han hevur designað alt millum himmal og jørð – alt frá urum, brillum, pasta, fototólum, innbúgvi, motorbátum og flogførum, er bildesign tað, sum hevur hansara størsta áhuga.

Giorgetto Giugiaro varð føddur 7. august 1938 í lítla býnum Garessio í Norðuritaliu. Bæði abbin og pápin fingust við at mála, so hann vaks upp í einum kreativum umhvørvi. Seinni flutti familjan til Torino, har hann gekk á kunstskúla og lærdi seg tekniskt design.

Sum 17 ára gamal fekk hann starv hjá Fiat og sum 21 ára gamal varð hann settur í leiðandi starv hjá Bertone Styling Centre, eini av leiðandi italsku fyritøkunum innan bilframleiðslu og design. Í 1965 fekk hann leiðandi starv hjá Ghia, sum hava nógv samstarv við Ford.

Í 1967 stovnaði hann sína egnu fyritøku, Ital Styling, har hann eisini samstarvaði við Ghia, og í 1968 stovnaði hann eisini designfyritøkuna Italdesign-Giugiaro SpA.

Alt ið hann designar, verður gjørt út frá tí einfaldu filosofi at tað skal vera funktionelt, áðrenn tað kann blíva snøgt. Har við meinar hann, at tað eru ikki designarar sum uppfinna lutirnar, men tað gera t.d. uppfinnarar og handverkarar, síðan kunnu designararnir geva lutunum smart design.

*Kelda: Fiat Magasinet "avanti"*



Alfa Romeo 156 er ein bilur sum Giorgetto Giugiaro er vorðin rættuliga kendur fyri

## Dømi um bilar sum Giorgetto Giugiaro hevur designað

| | |
|---|---|
| 1971-76: | Maserati Bora, Merek og Quattroporte |
| 1971: | Alfa Romeo Alfasud |
| 1974: | Alfa Romeo Alfetta GT/GTV |
| 1978: | Audi 80 |
| 1984: | Saab 9000 Turbo 16 |
| 2002: | Alfra Romeo Brera |
| 2003: | Alfa Romeo 156 |



Sp/f **RAG-VAG** Bil- & Dekkverkstaðið:

# Góð tænasta er okkara vørumerki

**Á statoilstøðini í Kollfjarðadali heldur fyritøkan Sp/f RAG -VAG Bil- og Dekkverkstaðið til. Verkstaðurin hevur spesialiserað seg í at geva góða tænastu**

BILVERKSTAÐUR
*Maguns Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan 1995 hava Ragnar P. Joensen og Vagnur Johannesen í Kollafirði rikið sína egnu fyritøku, **Sp/f RAG-VAG** Bil- og Dekkverkstaðurin, í Kollfjarðadali.

**RAG-VAG** er ein stytting av nøvunum Ragnar og Vagnur. Teir hava báðir drúgvar royndir í bilbranchuni. Ragnar er útbúgvin bilmekanikari, og Vagnur er útbúgvin innan handil.

Verkstaðurin hevur spesialiserað seg í at geva góða tænastu, og hava teir nógvar fastar kundar sum t.d. buss- og lastbilaeigarar og fleiri fyritøkur.

Teir gera bert smærri umvælingar, skifta olju, dekk og útstoyt, eisini umvæla teir róðurgreiðir og bremsur.

Umframt verkstaðin er Sp/f **RAG-VAG** ein stór dekksøla. Teir umboða Hankook dekkini og selja eisini onnur dekk bæði í smá- og heilsølu.

Verkstaðurin liggur væl fyri, tí nógv ferðsla er á vegnum gjøgnum Kollfjarðadal. Kundarnir hava eisini møguleika at vitja á Statoilstøðini, meðan tey bíða eftir bilinum.




*Starvsfólkið hjá RAG-VAG Bil- og Dekkverkstaðnum í Kollfjarðadali, f.v.: Ragnar P. Joensen, Niklas Súni Debes og Vagnur Johannesen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

HANKOOK




RAG-VAG
Bil & Dekkverkstaður
Postsmoga 15 • FO-410 Kollafjørður • Tel 42 16 21 • Fax 42 16 17 • rag-vag@post.olivant.fo